# Útbúgvingarprofilur

| LÝSING AV ÚTBÚGVING |
|---|
| **B.Ed. sum námsfrøðingur** – <br> *Bachelor of Education in Pedagogical Development* |
| |

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Námsfrøðingaútbúgvingin er skipað sum ein B.Ed.-útbúgving, ið telur 240 námsstig (4 lestrarár). |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Uttanríkis- og mentamálaráðið (UMMR) |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Galdandi frá august 2016. |
| STIG | Bachelor, “First cycle” sambært Qf-EHEA; stig 6 sambært EQF-LLL |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Endamálið er at útbúgva námsfrøðingar, sum eru førir fyri at fyrireika, fremja, eftirmeta, menna og skjalprógva námsfrøðiligt og sernámsfrøðiligt arbeiði við børnum, ungum og vaksnum. Ein útbúgvin námsfrøðingur skal somuleiðis vera førur fyri at grunda yvir og meta um námsvísindaligar meginspurningar. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Námsfrøðingaútbúgvingin er sett saman av tveimum høvuðspørtum: <br><br> 1. Einum almennum pedagogiskum parti, ið fevnir um bæði dagstovna- og serøkið, og snýr seg um námsfrøðilig grundtema so sum uppaling, umsorgan, samfelag, mentan, myndan, spæl, menning, læring, sosialisering og trivnað. <br> 2. Einum parti, ið er skipaður sum linjulestur. <br><br> Útbúgvingin miðar ímóti vøggustovum, barnagørðum, forskúlum, frítíðarskúlum, frítíðarheimum, ungdómshúsum, bústovnum, sambýlum, vardum verkstøðum og øðrum námsfrøðiligum stovnum. |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | Útbúgvingin er rættað móti námsfrøðiliga økinum. Útbúgvingin gevur førleika til at skapa innihaldsríkt og mennandi virksemi saman við teimum menniskjum, tey varða av. |
| 3 | KÓS | Akademisk útbúgving rættað ímóti einum ávísum yrki |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Fakliga innihaldið í útbúgvingini er grundað á vitan, sum er avgerðandi fyri arbeiði á námsfrøðiliga økinum. Arbeitt verður við námsfrøðiligum, sernámsfrøðiligum, sálarfrøðiligum, sosiologiskum og almendidaktiskum |

| | | |
|---|---|---|
| | | evnum og fyribrigdum, ið eru viðkomandi fyri námsfrøðiliga arbeiðið, sum skal roynast í verki í starvslærum. Harumframt miðsavna tey lesandi seg um tríggjar námsfrøðiligar linjugreinar. |

| | | |
|---|---|---|
| **C** | **STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING** | |
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Útbúgvingin gevur rætt til at verða sett/settur í starv innan námsfrøðiliga- og sernámsfrøðiliga økið. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | BEd-prógvið gevur atgongd til framhaldslestur á masterstigi (2nd cycle) á hægri lærustovnum, ið hava námsfrøði og atknýtt granskingarøki sum serøki. |

| | | |
|---|---|---|
| **D** | **ÚTBÚGVINGARHÁTTUR** | |
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Undirvísingarhættirnir eru fyrilestrar, floksundirvísing, einstaklingsuppgávur, einstaklingsframløgur, bólkaarbeiði, ið er skipað eftir ymiskum leistum, bólkaframløgur, evnisarbeiði, verkætlanararbeiði, verkstaðararbeiði, starvslærufrágreiðingar og portfolio. |
| 2 | PRÓVTØKUHÆTTIR | Skrivligar próvtøkur, heimauppgávur, bólka- og einstaklingsuppgávur, munnligar próvtøkur, synopsupróvtøkur við munnligari framløgu, portfolio við munnligari framløgu, munnlig framløga og eftirmeting av starvslæru. |

| | |
|---|---|
| **E** | **ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR** |
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | **Akademiskt arbeiðslag:** arbeiða kannandi og fyrihalda seg kritiskt og greinandi til spurdómar og keldur. Herundir eisini orða, lýsa, greina og tulka fakligar spurdómar og seta fram væl grundaðar niðurstøður og perspektivering.<br>**Málsligir førleikar:** orða seg neyvt og gjølla bæði í munnligum og skrivligum høpum.<br>**Samskiftisførleikar:** samskifta og samstarva tilvitað við menniskju, børn, ung og vaksin, ein varðar av, starvsfelagar og aðrar yrkisbólkar um fjølbroytt evni, við atliti at námsfrøðiligari menning.<br>**Relatiónsførleikar:** skapa góðar relatiónir við tey menniskju, ein varðar av, við eini viðurkennandi tilgongd og taka ábyrgd fyri relatiónirnar, ein er partur av.<br>**Sjálvstøðugt arbeiðslag:** arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í toymum. Loysa ítøkiligar uppgávur sjálvstøðugt og í bólki.<br>**Trupulleikaloysn:** staðfesta og loysa trupulleikar út frá einum etiskum grundarlagi, og at taka avgerðir.<br>**Vitan í praksis:** inna vitan í verki.<br>**Menning:** menna og dagføra egna læring og vitan.<br>**Skipanarførleikar:** fyrireika, ráðleggja og skipa námsfrøðiliga virksemi didaktist við støði í tí námsfrøðiliga umhvørvinum og einstaka menniskjanum. |
| 2 | FAKLIGIR FØRLEIKAR |
| | **Yrkisgrundarlag:** megna at fyriskipa og útinna námsfrøðiligt arbeiði við støði í lógum og kunngerðum, sum eru galdandi á økinum. Megna at skilja og kritisk meta um tann logikk námsfrøðiliga arbeiði byggir á.<br>**Námsfrøðiligur og fakligur førleiki:** duga at nýta grundleggjandi námsfrøðilig, sálarfrøðilig og didaktisk ástøði og háttaløg, tá ið námsfrøðiligt og sernámsfrøðiligt virksemi verður fyrireika, framt og eftirmett. Megnar við eini etiskari metingartilgongd kritisk at fyrihalda seg til umhvørvið og menniskja.<br>**Relatiónsførleiki:** duga at skapa góð sambond við menniskju, ið hava ymiskar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál. Megna at taka ábyrgd fyri relatiónunum. |

| | |
|---|---|
| | **Førleiki at samskifta:** dugir at samskifta skynsamt. Evnar at laga seg til ymsar støður og at liva seg inn í onnur menniskju. Evnar at taka atlit, at menniskju hava ymiskar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál við eini viðurkennandi tilgongd.<br>**Trivnaður:** Dugir at skapa eitt trygt og virðiligt umhvørvi, ið stimbrar og mennir. Megnar at skapa tolsemi og ein viðurkennandi sosialan felagsskap, sum inkluderar hvørt einstakt menniskja.<br>**Menning:** Evnar at eftirmeta og reflektera kritiskt um praksis og taka stig til at endurskoða námsfrøðiligu tilgongdina í mun til nýtt innlit og nýggja sannkenning. Megnar at luttaka í og fremja smærri granskingar- og menningarverkætlanir innan námsfrøðiliga økið. |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | Eftir lokna útbúgving, skal hin lesandi vera før/ur fyri at:<br>• greiða frá og greina tær lógir og kunngerðir, ið eru galdandi á stovnsøkinum og umseta tær til námsfrøðiligt virksemi.<br>• lýsa og greina demokratiska og kristna siðaarvin, og hvussu hesin hevur myndað virðisgrundarlagið undir føroyska samfelagnum.<br>• greiða frá og greina uppalingar- og myndanaruppgávu á stovnum.<br>• meta um, hvussu samfelagskarmar, harímillum lógarverk og aðrar politiskar avgerðir ávirka lívsrúmið, lívsmøguleikar og lívsgóðskuna hjá menniskjum.<br>• greiða frá fjølbroyttum námsfrøðiligum, sálarfrøðiligum og didaktiskum ástøði.<br>• greina og meta um ástøði og arbeiðshættir innan sosialisering, umsorgan, menning og læring<br>• lýsa og greina ymisk ástøði um, hvussu menniskju búnast, sosialiserast, mennast og læra, sæð í sálarfrøðiligum, mentanarligum og søguligum ljósi.<br>• greiða frá dagligum námsfrøðiligum virksemi.<br>• eftirmeta og skjalfesta dagligt námsfrøðiligt virksemi.<br>• menna ítøkiligar menningartilgongdir og verkætlanir við støði í viðurkendum ástøðum og háttaløgum, og sum skapa líkindi fyri, at menniskju trívast og mennast.<br>• nýta viðkomandi fakligt ástøði og kunnleika í námsfrøðiliga virkseminum.<br>• greiða frá og meta um, hvussu námsfrøðiligt virksemi kann skipast soleiðis, at øll børn, ung og vaksin mennast og læra á besta hátt.<br>• greiða frá og greina, hvussu námsfrøðiligt virksemi kann skipast soleiðis, at tað gevur møguleika fyri ávirkan og samábyrgd.<br>• lýsa, greina og taka avgerðir um yrkisetisk viðurskifti.<br>• greina og brúka granskingargrundaðan kunnleika í námsfrøðiligum høpi.<br>• luttaka, eygleiða og meta um námsfrøðiligt menningararbeiði.<br>• meta um, hvussu yrkissamleiki kann ávirka hugburð og arbeiðshættir.<br>• greina hvussu yrkissamleikin ávirkar menningar-, læru- og trivnaðarmøguleikarnar hjá teimum, ið ein varðar av.<br>• meta um, hvussu góðar relatiónir skapast við tey, ið ein varðar av, við støði í teirra menningarfortreytum, persónsmensku og áhugamálum<br>• greiða frá grundleggjandi viðurskiftum, ið gera seg galdandi, tá gott huglag og góður trivnaður skal skapast<br>• greiða frá samskiftis- og samstarvshættum við tey, ið námsfrøðingurin varðar av, samstarvsfelagar, foreldur og avvarandi.<br>• meta um hættir at samastarva í einum tvørprofessionellum samstarvi við aðrar fakbólkar og myndugleikar<br>• greina og brúka inkluderandi námsfrøði fyri at skapa trivna og menning hjá børnum, ungum og vaksnum.<br>• greiða frá hvønn týdning málsligir førleikar hava við atliti til at stuðla málmenning og samskiftisførleika<br>• greiða frá týdninginum av fjølbroytni á stovnum |